lívdin
- í lívd hins hægsta

Tíðindi
Kunning
Lýsingar
Skráir


# Tríggir ungir rithøvundar



Vinnarar av kappingini f.v.:
Marianna Holm Jacobsen,
Ólavur Kartni á Váli
og Lilja Sørensen

Desember 2006

Týsdagin 28. november var hátíðarhald hjá Farodane City í Havn í sambandi við at vinnararnir av stuttsøgukappingini hjá barnablaðnum STROK vóru kosnir. Tey vóru:
Ólavur Kartni á Váli, Lilja Sørensen og Marianna Holm Jacobsen, sum øll ganga í Lívdini.

Ólavur vann fyrstu virðisløn fyri søguna “Kongaliga sjúkan” og fekk eina Toshiba farteldu, Lilja vann aðru virðisløn fyri søguna “Dreparin” og fekk ein iPod Video, og Marianna vann triðju virðisløn fyri søguna “Kinasandurin” og fekk ein iPod Nano. Vinningarnir vóru frá Farodane City.

Ólavur er 13 ára gamal og gongur í 6. flokki í Sankta Frans skúla, Lilja er 13 ára gomul og gongur í 7. flokki í Sankta Frans skúla, og Marianna er 10 ára gomul og gongur í 4. flokki í Hoyvíkar skúla.

Tá freistin at lata søgur inn til kappingina var úti 6. november 2006, høvdu fleiri enn hundrað børn sent søgur inn. Í dómsnevndini sótu Beinta Johannessen, blaðstjóri á Strok, Niels Jákup Thomsen, leiðari á Bókadeild Føroya Lærarafelags, Marjun Kjelnæs, rithøvundur og Dánial Hoydal, rithøvundur.

Sagt verður, at hópin av góðum søgum vóru komnar inn, og tí var sera torført hjá dómarunum at velja bestu søgurnar burtur úr rúgvuni. STROK fer næsta ár at prenta fleiri av søgunum, sum komu inn til kappingina.

Vit halda at hetta var virkuliga flott og ynskja vinnarunum hjartaliga tillukku.

## Minnist til at siga okkum frá!

Vit heita á øll í samkomuni at siga okkum frá, um tit hava okkurt, sum tit ynskja at fáa við í faldaran sum t.d. børn sum verða født, brúdleyp, gullbrúdleyp o.s.fr.

Í sambandi við rundar føðingardagar skriva vit ein stubba um fólk í samkomuni, sum fylla 50, 60, 65, 70, 75, 80, 85, 90, 95 og 100 ár.

Teldupostadressan er: faldarin@livdin.fo



## Tær gloymdu jólagávurnar

Jólamánaðurin er nú byrjaður, og vit eru øll farin at stákast til jóla. Í øllum resinum er tað skjótt at gloyma tað, sum er umráðandi: At seta seg í samband við ein gamlan gloymdan vin. At skriva eitt bræv, sum fyri langt síðani skuldi verið skrivað og sent. At vera tolin og náðiríkur móti einum illum kunda. At siga einum at tú setir prís upp á hann ella hana. At gleða eitt barn. Lurta. Njóta góðan tónleik. Ikki krevja so nógv av øðrum. Sløkkja sjónvarpið og tosa ístaðin. At hjálpa eini troyttari mammu. Uppmuntra gamlan mann ella gamla kvinnu. Troysta bróðir ella systir í Lívdini, sum syrgja. Siga mammu og pápa hvønn týdning tey hava fyri teg. Tilbiðja Harran og takka Honum fyri størstu gávuna av øllum.

Harrin signi jólamánaðin fyri okkum øll í Lívdini!

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini



## Berit og Mikkel gift

Fríggjadagin 30. juni 2006 giftust í Býráðssalinum í Havn, Berit Petersen og Mikkel Johannesen, bæði av Argjum. Tey búgva í Kollafirði og eiga børnini Gunnhild Mariu, 8 ár, og Kristian Martin, ið er hálvtannað ár. Vit ynskja teimum hjartaliga tillukku.

## Barbara Jakobsen við Doulos

Barbara Jakobsen fór úr Føroyum 9. januar 2006 og skal vera við trúboðanarskipinum Doulos í tvey ár. Hon arbeiðir í bókasøluni umborð, nú sum "shiftleader" á aðrari vaktini.

Barbara sigur í tíðindaskrivi, at meðan Doulos er í turrdokk, er hon saman við fýra øðrum gentum farin til Teilands, til býin Udonthani við 300.000 íbúgvum. Tær skulu vera lærarar á einum skúla í næstan tríggjar vikur, har tær undirvísa í enskum.



*Barbara er niðast til vinstru á myndini*

Teldupost-adressan hjá Barbaru er:
barbara.jakobsen@mvdoulos.org
*men* meðan hon er í Teilandi er adressan:
Barbara_a_j@hotmail.com
Barbara gleðir seg at koma heim til Føroyar í jólaferiu 22. desember til 3. januar.



## Tillukku við barninum

9. november fingu Katrin Dagbjartsdóttir og Mats Brisenfeldt í Havn ein son, ið eitur Ísak. Hann var 55 cm langur og vigaði 3.700 gr.

13. november fingu Lis og Svend Åge Drewsen í Hoyvík ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3.500 gr.

## TILTØK Á BREKKU 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



Á Brekku 3

| | |
|---|---|
| Bønarløta fyri ung | mikukvøld kl. 18.00 |
| Undirvísing og bøn | týskvøld kl. 20.00 |
| *(Triðja hvørt týskvøld eru húsbólkar)* | |
| Ungdómsmøti | fríggjakvøld kl. 20.30 |

## Lívsdroparnir

er tiltak fyri børn frá 1. til 10. flokk á Brekku 3 í Hoyvík

**Børn og ung frá 1. til 5. flokk**

Børn og ung frá 1. til 5. flokk: kl. 16.45-19.00
Børn og ung frá 6. til 10. flokk: kl. 17.45-20.00

Eru spurningar, eru tit vælkomin at
seta tykkum í samband við:

| | |
|---|---|
| Poula Sørensen | tel. 310322 / 220429 |
| Anna Maria Anthoniussen | tel. 320309 / 228826 |

### Lívsdroparnir

Vit nýta nógva tið til at hava tað stuttligt og hugna okkum saman.

- søga
- bólkaarbeiði
- nýggjir vinir
- hava tað stuttligt
- syngja
- leikur
- gera ymiskt handaligt arbeiði

Øll eru hjartaliga vælkomin!
Bjóðið endiliga øðrum við.

## Sunnudagsskúlin

*- Guttorm nýggjur í leiðsluni*

Unn Zachariassen, ið var við til at seta sunnudagsskúlan í Lívdini á stovn fyri skjótt 4 árum síðani, hevur nú avgjørt at halda seg meira til hjúnabandsráðgevingina og at taka seg úr sunnudagsskúlaleiðsluni. Vit takka Unn fyri tíðina, hon hevur verið við í leiðsluni, og fegnast um at Guttorm Joensen er komin upp í sunnudagsskúlaleiðsluna.

Uml. 100 børn ganga í sunnudagsskúla í Lívdini. Sunnudagsskúlin hevur altíð brúk fyri fólki til nógvar ymiskar tænastur. Áhugað kunnu venda sær til ein í leiðsluni.

Sunnudagsskúlaleiðslan er nú: Beinta Áargarð, Siri Davidsen, Guttorm Joensen og Durita Djurholm.

Sí meira um sunnudagsskúlan á www.livdin.fo



*Unn Zachariassen*



*Guttorm Joensen*

## Samkomufundur

Týsdagin 28. november var ein samkomufundur í hølunum á Brekku. Høvuðsevnið á fundinum var um at seta okkum nýggj mál í sambandi við byggingina av nýggja samkomubygninginum. Meira í næsta blað (januar 2007).



*Selmar Nielsen, arkitektur, greiðir frá*

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



### Sunnudagin 3. desember

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Hugleiðingar um missión.*
*Talari: Ólavur Jøkladal.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónsdagur. Talarar: Leiðslan.*

### Sunnudagin 10. desember

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Hugleiðingar um familjuna.*
*Talarar: Beinta og Absalon Áargarð.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið.*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 17. desember

Familjumøti kl. 10.30: *Prát við trúbóðarar.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið.*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 24. desember

Jólaløta (eitt møti frá kl. 12.00-13.00)

### Sunnudagin 31. desember

Nýggjársløta (eitt møti frá kl. 12.00-13.00)

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

# Tíðindi





## Hoyvíkar kirkja reist

Fríggjadagin 20. oktober varð Hoyvíkar kirkja reist. Tað er byggifelagið Articon, sum stendur fyri arbeiðinum.

Jón Danielsen, stjóri í Articon, segði undir hátíðarhaldinum, at arbeiðið gongur væl, og teir vænta at tíðarætlanin heldur.

Hans Jacob Joensen, bispur, var eisini til hátíðarhaldið. Hann var væl nøgdur við byggingina og segði, at hetta er ein gomul verkætlan, og vit síggja við gleði fram til at fáa kirkjuna lidna. Eftir ætlan skal kirkjan verða liðug í september 2007.

## Ebenezer liðugt umbygt

Umleið 1000 fólk vóru til móttøku í Ebenezer leygardagin 11. november, tá bygningurin aftur varð tikin í nýtslu eftir eina stóra umbygging. Arbeiðið við at umbyggja Ebenezer hevur tikið eitt ár. Byrjað varð í november 2005.

Húsið er stásiligt. Grótlagt gólv og flísar á veggjunum og harmonerar hetta sera væl. Stórur dentur er lagdur á ljóðviðurskiftini, sum nú eru framúr góð. Í Ebenezer eru tríggir salir við umleið 1200 sitiplássum, har teir minnu salirnir hava stórskíggjar, so øll kunnu fylgja við tí sum fer fram.

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*